


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 20 - 11 - 2012

# BP nýggj leitiloyvi í Nova Scotia

Bretska oljufelagið BP, sum leingi hevur verið á breddanum í altjóða miðlum fyri dálkingina í Meksikanska flógvanum, hevur eftir at døma eydnuna við sær, tá tað snýr seg um at fáa nýggj loyvi at leita eftir olju og gassi. Myndugleikarnir í kanadiska landslutinum Nova Scotia hava júst kunngjørt, at BP fær fleiri av nýggjastu leitiloyvunum í hesum lutvíst nýggja oljulandslutinum í Norðuratlantshavi. Mike Daly, BP stjóri fyri altjóða leiting sigur í eini viðmerking, at felagið er fegið um at hava fingið nýggju leitiloyvini á djúpum vatni út fyri kanadisku strondina, og at hetta fer at fáa týdning fyri víðari arbeiðið hjá BP í hesum partinum av Atlantshavinum. BP hevur annars nógv áhugaverd leitiloyvi hinumein Atlantshavið, eitt nú vestan fyri Hetland. Her er felagið í gongd við eina milliarda útbygging av Clair og Schiehallion leiðunum umframt at bora djúpvatnsbrunnin North Uist nær føroyska markinum.